# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Fyrstu liðini breyðføddu sær sjálvum

TALV

*Ólavur Simonsen*
*olavur@sosialurin.fo*



*Myndatekstur: IM Helgi D. Ziska skumpar Havnina upp eftir stigatalvuni*

Eftir at liðkappingin í talvi var hálvrunnin, hevur steðgur verið í kappingini í meira enn ein mánaða. Men sunnudagin vóru heilarnir tiknir av hillunum aftur, tá sætta umfar varð avgreitt. Vestmanna talvfelag økti um leiðsluna við einum hálvum stigi og er nú samanlagt hálvt fjórða stig framman fyri argastu kappingarneytarnar úr Klaksvík.

### Innanhýsis uppgerð

Fyri at gera kappingina so rættvísa sum gjørligt, møtast liðini úr sama felagi altíð í byrjanini av kappingini og fyrst í seinnu hálvu. Hetta verður gjørt, so liðini ikki møtast í seinasta og avgerandi umfari, har tað er møguligt at ávirka útslitið við snildum.

Soleiðis var eisini sunnudagin, har fyrsta og annað lið hjá vestmenningum telvaðu í Vestmanna, meðan fyrsta og annað lið hjá klaksvíkingum telvaðu í Klaksvík. Hetta vóru dystir, har stórsigur var krav hjá báðum fyrstu liðunum.

### Fult stigatal uttan Rødgaard

Hóast John Rødgaard ikki var at síggja á liðinum hjá vestmenningum, vann fyrsta liðið 4-0. Í slíkari uppgerð er tað ikki ein stórur missur, at liðið manglar ein mann. Tað førir bert við sær, at ein annar má flyta upp úr øðrum liði, og tí viknar tað ofta samsvarandi.

Carl E. N. Samuelsen, Martin Brekká og Samson Højgaard fingu stigini trygt heim, meðan Kári Durhuus sá út til at vera komin í trupulleikar móti Rógva Hansen. Kári hevði eina lotu tapta støðu, men tað vísir seg, at tann royndi telvarin ofta dregur tað longra stráið. Ein feilur hjá Rógva gav vestmenningum vónina aftur, og hesaferð snávaði Kári ikki.

### Stórsigur ov lítil

Ein sigur á hálvt fjóra stig er vanliga framúr gott úrslit, men fyri fyrsta liðið hjá klaksvíkingum merkti hetta, at teir dragnaðu eitt hálvt stig í kappingini um FM heitið. Finnbjørn Vang, Rani Nolsøe og Terji Petersen togaðu trý trygg stig heim, meðan talvið millum Steintór Rasmussen og Willa Olsen endaði javnt.

### Helgi við Havnini

Seinasti dysturin í fyrstu deild varð telvaður millum Havnina og Sandavág. Í kappingini um triðja plássið tók Havnin, sum í løtuni tykist at hava tikið dik á seg, seg eitt stig inn á Sandavág við at vinna 2½ - 1½.

Ein av hesum orsøkum er heilt sikkurt, at altjóða meistarin Helgi D. Ziska hevur telvað við tvey tey seinastu umførini. Við einum sigri á Torkili Nielsen tryggjaði Helgi Havnini sigurin í einum tí mest spennandi talvinum í vikuskiftinum.

### Endaspurturin nærkast

Við greiðu leiðsluni kunnu vestmenningar næstan tapa ein dyst 4-0 uttan at missa fyrsta plássið. Hetta krevur av klaksvíkingum, at teir seinastu fýra umførini fáa fulla úrtøku, um teir skulu endurvinna FM heitið. Komandi vikuskifti møta klaksvíkingar øðrum liði hjá vestmenningum, meðan fyrsta liðið hjá Vestmanna møtir ein vælkoyrandi liði úr Havnini, sum heilt sikkurt roynir at klatra upp eftir stigatalvuni eftir eina heldur slaka byrjan.

### Havnin oddalið í 2. deild

Spennandi er eisini at vita, hvat lið kemur upp í fyrstu deild komandi ár. Her hevur Havnin lagt seg klárt á odda hálvt fimta stig framman fyri Kollafjørð. Um Havnin klárar at halda stevið, er hetta fyrstu ferð, at Havnin hevur tvey lið í 1. deild. Hetta er tó treytað av, at liðið í fyrstu deild ikki flytur niður.

**Støðurnar í ymsu deildunum eftir 6. umfar eru:**

| | | |
|---|---|---|
| **1. deild** | | Stig |
| | Vestmanna 1 | 20 |
| | Klaksvík 1 | 16½ |
| | Sandavágur | 13 |
| | Havnin | 11 |
| | Klaksvík 2 | 7 |
| | Vestmanna 2 | 4½ |
| **2. deild** | Havnin 3 | 18 |
| | Kollafjørður | 13½ |
| | Toftir | 13 |
| | Klaksvík 3 | 10 |
| | Havnin 2 | 9½ |
| | Sandavágur 2 | 8 |
| **3. deild A** | Vestmanna 3 | 14½ |
| | Skopun | 13 |
| | Sandavágur 3 | 12 |
| | Klaksvík 4 | 8½ |
| **3. deild B** | Gøta | 14½ |
| | Rókur | 14 |
| | Havnin 4 | 12½ |
| | Vestmanna 4 | 7 |
| **Unglingar** | Klaksvík | 12½ |
| | Rókur | 10 |
| | Vestmanna | 9½ |
| | Havnin | 9 |
| | Sandavágur | 7 |



# Kapping um verjuplássini

**Enska stórfelagið, Liverpool hevur havt trupult við at fingið verjuna at virka til fulnar. Skaðar og annað hava tarnað samanspælinum, og nú hevur venjarin, Rafael Benitez valt at keypa Martin Skrtel, ið dagliga spælur í Russlandi**

FÓTBÓLTUR

*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Liverpool heinta tann slovakiska verjuleikaran, Martin Skrtel i russiska Zenit Skt. Petersburg, og tað verður harðari kapping um plássini í miðverjuni. Slovakin, Skrtel kemur at kappast um plássini við Jamie Carragher, Daniel Agger og Sami Hyypiä.

Skrtel hevur tey síðstu trý árini spælt í russiska Zenit Skt. Petersburg, og nú slær hann metið hjá dananum, Daniel Agger, sum dýrasti verjuleikari í søguni hjá Liverpool. Agger kostaði um 63 milliónir, meðan prísurin á nýggja manninum á Merseyside, sambært Ekstra Bladet, er á leið 70 milliónir.

191 cm. høgi og 23 ára gamli Skrtel verður róptur ein av mest lovandi verjuleikarunum í Europa. Hann er longu komin til Liverpool og skal skjótast gjørligt gjøgnum eina læknakanning, ið vanligt er. Og gongur alt eftir vild, fáa vit Skrtel at síggja móti Middlesbrough um vikuskiftið.

Daniel Agger hevur verið nógv skaddur, og venjarin, Rafael Benitez veit ikki, nær hann aftur hevur danan kláran til dyst. Annan jóladag varð so eisini Hyypiä raktur av einum skaða. Hetta hevur fingið Benitez at keypt unga slovakan, sum ikki bert verður sikrings leikari, men desideraður kappingarneyti.

Rick Parry frá stjórnini í Liverpool var sambært heimasíðu felagsins, í Russlandi í vikuskiftinum, har avtalan við Zenit, í veruleikanum varð avgreidd.